## Fyrilestur 23. oktober 2002 – 50 ára dagur Fróðskaparfelagsins

## Amtmaðurin og Løgtingið frá 1852 til 1948.

### Endurreisn Løgtingsins, heimildir og uppgávur

Tað Løgting, sum varð endurreist í 1852, var stórt sæð eitt danskt amtsráð, sum var lagað til føroysk viðurskifti. Løgtingið skuldi veljast av teimum, sum valrætt høvdu, og Amtmaðurin, hægsti embætismaður kongs í amtunum, skuldi vera fastur formaður í Løgtinginum. Prósturin skuldi vera fast løgtingsumboð. Sostatt var løgtingið sett saman av 16 fólkavaldum umboðum – hetta tal varð seinni hækkað – og tveimum donskum embætismonnum, harav tann eini eisini var formaður. Hetta var stórt sæð sama skipan, sum var galdandi viðvíkjandi donsku Amtsráðunum.

Ein av grundunum til at hendan skipan, sum fyri ein nútíðar eygleiðara kann tykjast lítið fólkaræðislig, var vald, var tann, at tað frá danskari síðu ikki var mett, at tað millum føroysku bóndastættina fanst ein upplýst elita, sum einsamøll megnaði at bera ein tílíkan umboðsstovn. Hesum sjónarmiðum vóru politiskt virknir føroyingar í samtíðini, eitt nú Niels Winther, sum tó var ímóti at Amtmaðurin skuldi vera formaður í Løgtinginum, ikki heilt ósamdir við donskum myndugleikum í. Upplýsingarstøðið og politiska medvitið millum donsku bóndirnar var ikki stórvegis øðrvísi enn í Føroyum, hóast tað í teimum størru donsku býunum fanst ein upplýst handilsmannastætt, sum hevði politiskt medvit. Tí gjørdist Amtmaðurin eisini formaður í donsku Amtsráðunum.

Hartil kom, at Løgtingið, eins og donsku Amtsráðini, hevði uppgávur at røkja, ið gjørdu tað neyðugt at styrkja um tann fakliga og fyrisitingarliga førleikan í tinginum. Í høvuðsheitinum hevði Løgtingið tvær høvuðsuppgávur at røkja í Føroyum:

1. Tað skuldi taka sær av *fyrisitingini* av nøkrum amtskommunalum uppgávum í Føroyum *vegna* ríkismyndugleikarnar, og
2. Tað skuldi virka sum *ráðgevi* hjá ríkismyndugleikunum viðvíkjandi serføroyskari lóggávu.

Tað var helst tann fyrra uppgávan hjá Løgtinginum, - fyrisiting av amtskommunalum uppgávum vegna ríkismyndugleikarnar - sum gjørdi tað alneyðugt at geva Amtmanninum, tí fakliga serkunnleikanum, sum sambært fyriskipan frá 1821 altíð skuldi vera løgfrøðingur, víðfevndar heimildir *í* og *yvir* Løgtinginum. Umframt at vera fastur formaður í Løgtinginum, hann skipaði alt løgtingsarbeiðið, fyrireikaði fundirnar og tingmálini, kallaði tingið saman og upploysti tað, hevði Amtmaðurin heimild til at freista løgtingssamtyktir, sum hann metti vera í stríð við galdandi

lóggávu. Harumframt hevði hann rætt til at taka avgerðir Løgtingsins vegna millum tingseturnar – frá 1852-1854 saman við tveimum løgtingsumboðum, sum Løgtingið valdi. Sæð í samanhangi við tann veruleika, at Løgtingið ikki kundi vera saman í meira enn 4 vikur uttan samtykki Amtmansins, var hendan heimildin hjá Amtmanninum sera víðfevnd. Fyrisitingarligu uppgávurnar settu krøv til Løgtingið og donsku Amtsráðini um løgfrøðiligan serkunnleika, sum einans Amtmaðurin hevði.

Hóast Niels Winther upprunaliga hevði verið ímóti uppskotinum hjá ríkismyndugleikunum, sum staðfesti, at Amtmaðurin og Prósturin skuldu fáa fastan sess og atkvøðurætt á tingi, so var tað at byrja við ikki nøkur stór mótstøða millum tingmenn móti sterku støðu Amtmansins í Løgtinginum. Tvørturímóti. Tá løgtingslógin í 1854 eftir tilmæli frá Løgtinginum var broytt, ynskti løgtingsmeirilutin at styrkja um heimildir Amtmansins í Løgtinginum. Hetta hevði m.a. við sær, at trímannanevndin, har amtmaðurin skuldi vera formaður meðan Løgtingið valdi hinar báðar, sum sambært løgtingslógini frá 1852 skuldi sita millum tingseturnar, var niðurløgd. Tað eftirlit, sum Løgtingið gjøgnum hesa millumtinganevnd kundi havt við Amtmanninum, varð sostatt avtikið í 1854. Vald Amtmansins gjørdust tískil nærum einaveldugt millum tingseturnar aftaná 1854.

Tann seinna uppgávan hjá Løgtinginum – at virka sum ráðgevi hjá ríkismyndugleikunum viðvíkjandi serføroyskari lóggávu – var hinvegin høvuðsgrundin til, at Løgtingið hóast alt ikki gjørdist fullkomiliga samlíkt við donsku Amtsráðini. Hóast tað ikki var mett, at føroyskir ella danskir bóndir einsamallir megnaðu at bera eitt Amtsráð, so var tað heldur eingin í Danmark sum ímyndaði sær, at danski Ríkisdagurin einsamallur var førur fyri at smíða lóggávu til tað føroyska øki, har viðurskiftini vóru so nógv øðrvísi enn í Danmark. Hóast Føroyar komu undir danskt vald í 1380 saman við Noregi, so vóru tær nærum alla tíðina fram til 1814, tá Danmark misti Noregi, men ikki Føroyar, Ísland og Grønland, stjórnaðar eftir norskum lógum og lógskipanum, sum víktu nógv frá donsku lóggávuni. Hetta hevði við sær, at longu í 1813 og 1821 varð staðfest, at lógir, sum skuldu setast í gildi í Føroyum, skuldu til ummælis hjá lokala sakkunnleikanum, tvs. Amtmanninum, áðrenn tær vóru settar í gildi, og tá Løgtingið, sum ein avleiðing av fólkaræðisligu rembingunum og donsku grundlógini frá 1849, varð endurreist í 1852, vóru hesar serstøku umstøður høvuðsgrundirnar til, at Løgtingið fekk ráðgevandi uppgávur at røkja vegna Føroya fólk mótvegis danska Ríkisdegnum, sum vóru nógv víðfevndari enn tær, sum donsku Amtsráðini høvdu.

Í fyrsta lagi høvdu donsku amtsráðini einans heimild til at ummæla lógaruppskot, sum ríkismyndugleikarnir løgdu fyri tey, meðan føroyska Løgtingið harumframt fekk rætt til sjálvt at samtykkja lógaruppskot, sum tað kundi leggja fyri ríkismyndugleikarnar. Við øðrum orðum fekk Løgtingið ikki einans – eins og donsku

Amtsráðini - *ummælisrætt* viðvíkjandi lóggávu, sum *ríkismyndugleikarnir tóku stig til* at seta í gildi, men Løgtingið fekk harumframt staðfest *initiativrætt* mótvegis ríkismyndugleikunum viðvíkjandi lóggávu, sum *Løgtingið ynskti* skuldi vera sett í gildi í Føroyum. Hartil kom, at í 1866 varð staðfest, at Løgtingið skuldi velja føroyska Landstingsmannin – annað føroyska umboðið í danska Ríkisdegnum. Harvið gjørdist tann fólkaræðisliga ráðgevingin til danskar myndugleikar sum Løgtingið fekk, nógv víðfevndari enn tær, sum donsku Amtsráðini fingu. Men grundleggjandi var Løgtingið, eins og donsku amtsráðini, ein ráðgevandi stovnur hjá ríkismyndugleikunum, hóast ráðgevingin eisini fevndi um initiativrætt. Lóggávuvaldið var óskert hjá Ríkisdegnum.

Heldur ikki hesum viðvíkjandi var stór misnøgd millum føroyingar við tann stovn, sum teir fingu í 1852. Teir fáu føroyingar, sum vóru politiskt virknir um tað mundið, tá Løgtingið var endurreist, kravdu ongantíð at Løgtingið viðvíkjandi lóggávu skuldi vera annað enn ein ráðgevandi stovnur. Lóggávuvald til Løgtingið var ongantíð sett fram sum eitt krav.

Hesar umstøður í Føroyum høvdu við sær, at tann løgtingsskipan, sum grundstøði var lagt undir í 1852, var galdandi til 1923 í stórt sæð óbroyttum líki, tá ein heilt nýggj løgtingslóg varð sett í gildi. Størsta fólkaræðisliga broytingin, sum hendi í hesum tíðarskeiðinum, valrættur til kvinnurnar, sum kom í 1916, hendi ikki sum ein avleiðing av føroyskum krøvum, hóast valrættur til kvinnur hevði staðið á stevnuskránni hjá Føroya Framburðsfelag longu í 1903. Hendan broytingin hendi í sambandi við at danska grundlógin varð broytt í ein meira fólkaræðisligan rætning í 1915, tá donsku kvinnurnar fingu valrætt. Tær umstøður, sum førdu til at løgtingslógin var broytt í ein meira fólkaræðisligan rætning í 1923, tá Amtmaðurin og Prósturin mistu fasta sessin í Løgtinginum, hendu eisini sum partar av teimum fólkaræðisligu nýskipanum, sum hendu í Danmark um hetta mundi, og í minni mun sum úrslit av føroyskum stríði.

Ikki tí, tað vóru av og á nakrir føroyingar, sum stríddust fyri at broyta løgtingslógina, soleiðis at skipanin annaðhvørt gjørdist meira fólkaræðislig ella at Løgtingið fekk størri heimildir, men tað var sjáldan at meiriluti fekst fyri nøkrum uppskoti, sum hevði týðandi broytingar við sær. Størsta broytingin í løgtingsskipanini, sum føroyingum stóð í boði at fáa undan 1923 var tað sokallaða Tilboðið, sum Jóannes Patursson fekk frá donsku stjórnini í 1906, men tað var sum kunnugt Føroya Fólk og løgtingsmeirilutin, sum feldu hetta uppskotið, sum miðaði ímóti at geva føroyingum eitt slag av heimastýri í Danmarkar ríki. Eydnaðist tað at fáa meiriluti í Løgtinginum fyri onkrum uppskoti, sum miðaði ímóti at broyta løgtingslógina, so var hann altíð so mikið lítil, ella eisini vóru uppskotini so mikið illa fyrireikaði, at einki kom burtur úr kortini. Amtmaðurin, tann løgfrøðiligi sakkunnleikin, var sum oftast í tí partinum í

Løgtinginum, sum ikki ynskti víðfevndar broytingar, og tað kom tí ofta at vera hansara tilmæli, sum ríkismyndugleikarnir fylgdu, tá saman um kom.

**Trupulleikar við Løgtingsskipanini**

Hóast stórur áhugi ikki var í Føroyum fyri at broyta løgtingslógina í tíðarskeiðinum undan 1923, so var tað júst hetta, at Amtmaðurin hevði so sterka støðu í Løgtinginum, serstakliga tá talan var um tær meira fólkaræðisligu og ráðgevandi uppgávurnar hjá Løgtinginum, sum skjótt skuldi vísa seg sum ein trupulleiki í nýggja Løgtinginum.

Tað nýggja Løgtingið, sum var endurreist í 1852 fekk, orsakað av teimum øðrvísi umstøðunum í Føroyum, nógv størri fólkaræðisligar uppgávur at røkja vegna Føroya Fólk enn donsku Amtsráðini høvdu í Danmark, hóast tað í aðra máta var skipað á sama hátt sum tey donsku Amtsráðini - tvs. við Amtmanninum sum formanni og Próstinum sum føstum umboði. Hetta kundi ikki annað enn hava trupulleikar við sær. Kongsins embætismenn, serstakliga Amtmaðurin, sum ikki var fólkaræðisliga valdur, høvdu víðfevndar heimildir *í* og *yvir* einum Løgtingi, sum hevði nógv størri fólkaræðisligar uppgávur at røkja vegna Føroya Fólk enn donsku Amtsráðini høvdu í Danmark. Andsøgnin millum *fólkaræði* og *embætisveldi* var á ein hátt bygt inn í Løgtingsskipanina.

Tað vísti seg eisini skjótt eftir stovnanina av Løgtinginum í 1852, at samstarvið millum Amtmannin og tann fólkavalda partin av Løgtinginum ikki gekk væl. Longu í 1853, árið eftir endurreisn Løgtingsins, hevði Niels Winther í Ríkisdegnum peika á, at Dahlerup Amtmaður "*stadig taler siddende ... medens de andre medlemmer rejser sig op, når de har ordet, at han fløjter ad de medlemmer, hvis tale han ikke ynder ... og nægter de medlemmer ordet, der vil protestere derimod*". Tað var kortini ikki fyrr enn í 1860, trý ár eftir at Niels Winther var rýmdur úr Føroyum, at stríðið millum meirilutan av teimum fólkavaldu í Løgtinginum og Dahlerup kom í hæddina. Tann 22. august hetta árið rýmdu 12 av 18 fólkavaldum umboðum úr Løgtinginum, og í brævi til Løgmálaráðið dagin eftir greiddu teir 12 frá, at tað var teimum "*en Umulighed i Fremtiden at arbejde i Færøernes Lagting, saalænge Her Amtmand Dahlerup er dettes Formand*". Høvuðsgrundgevingin hjá teimum 12 fyri at ríma úr Løgtinginum var, at Dahlerup "*i den Grad har været egenrådig og Hensynsløs*" og "*viist en Haan og Foragt, som det umueligt lader sig beskrive*".

Alt bendir sostatt á, at í 1860 var tað ikki sjálvt Amtmansembætið, sum teir 12 vildu hava úr Løgtinginum, men tað var einans persónurin Dahlerup, sum var trupulleikin. Hetta framgongur eisini av tí veruleika, at tá Løgmálaráðið í 1861 valdi at taka støðuna hjá løgtingsmeirilutanum til eftirtektar, og setti Peter Holten í

Amtmansembætið í staðin fyri Dahlerup, sum varð fluttur í annað starv í Danmark, valdi løgtingsmeirilutin at møta á tingið aftur. Síðan var friður um spurningin í 20 ár.

Einki bendir á, at trupulleikin millum løgtingsmeirilutan og Amtmannin í 1860 hevði nakað við fólkaræðisligu uppgávur Løgtingsins at gera. Tvørturímóti nevndi klagan frá teimum 12 til Løgmálaráðið einans trupulleikar við persóninum Dahlerup og í minni mun hansara fyrisitingarligu førleikar. Einki var nevnt um, at Dahlerup legði seg út í ráðgevandi uppgávur Løgtingsins mótvegis Ríkisdegnum, hóast hann sambært løgtingslógini hevði somu heimildir hesum viðvíkjandi, sum hann hevði á tí fyrisitingarliga økinum. Kortini ber til at siga at her hómast byrjanin til eitt fólkaræðisligt stríð fyri at vinna Løgtinginum størri heimildir mótvegis Amtmanninum. Hóast tað var persónurin Dahlerup, sum ítøkiliga klagað var um, so var tað sjálv løgtingsskipanin, sum setti Amtmannin í eina valdsstøðu mótvegis teimum fólkavaldu, sum teir fólkavaldu ikki kundu góðtaka. Soleiðis tulkaði Dahlerup sjálvur í øllum førum hetta stríðið, sum hann metti hevði røtur í tí veruleika, at Amtmaðurin var fastur formaður í Løgtinginum. Sjálvur metti hann, at skipanin átti at veri broytt, soleiðis at Løgtingið sjálvt valdi sín formansskap, men hetta var ikki tikið til eftirtektar av Løgmálaráðnum.

Hóast Løgtingið sum nevnt ikki uttan víðari kann samanberast við donsku Amtsráðini, so eigur hendan støðutakanin hjá Løgmálaráðnum til uppskotið hjá Dahlerup at síggjast í samanhangi við tann veruleika, at Amtmaðurin eisini var formaður í donsku Amtsráðunum. Samansetingin av Løgtinginum, við Amtmanni sum formanni, var í samsvar við tær skipanir, sum vóru galdandi í líknandi stovnum í Danmark í tíðini. Tó so, prósturin misti sæti í donsku Amtsráðunum longu í 1855, men fólkaræðisliga rakið í Danmark, sum byrjaði við 1849 grundlógini, var við at venda, tá komið var inn í 1860-ini. Í 1866, tá grundlógin var broytt, tilskilaði kongur sær rætt til at tilnevna 12 umboð í Ríkisdagin fyri lívstíð, samstundis sum ríkir góðseigarar og borgarar fingu rætt til at velja eitt frammanundan ásett tal av umboðum. Politiska rákið í Danmark í 1860-unum var ikki við Dahlerup.

Meira hendi ikki viðvíkjandi spurninginum um at broyta løgtingslógina fyrr enn í 1881. Hetta árið legði P.O. Effersøe uppskot fyri Løgtingið, sum miðaði ímóti, at Prósturin skuldi úr Løgtinginum, meðan Amtmaðurin framvegis skuldi vera formaður í Løgtinginum. Harumframt skuldi Løgtingið hava størri fyrisitingarligar heimildir. Hetta lítið víðgongda uppskotið kom ígjøgnum allar tríggjar viðgerðirnar í tinginum, men tað fekk ikki undirtøku frá fleiri enn 10 løgtingsumboðum – 9 atkvøddu ímóti. Hóast meirilutin í Løgtinginum var lítil, so var tað helst tann veruleiki, at Amtmaðurin Hannes Finsen av eini ella aðrari grund var ímóti uppskotinum, sum var høvuðsgrundin til, at uppskotið ikki vann frama í Ríkisdegnum. Í øllum førum var tað ikki víðgongt av Effersøe í 1881 at seta fram uppskot um at fáa Próstin úr

Løgtinginum, tí hann var sum nevnt longu í 1855 farin úr donsku Amtsráðunum. Hinvegin var uppskotið til broytingar í løgtingslógini, sum tingmaðurin Johan Hendrik Schrøder í 1884 legði fyri tingið, sum miðaði ímóti, at bæði Amtmaðurin og Prósturin skuldu úr tinginum, víðgongt, um samanborið verður við tíðarrákið í Danmark. Løgtingið skuldi sambært hesum uppskotinum gerast ein fólkavaldur stovnur burturav, Amtmaðurin og Prósturin skuldu missa fasta sessin í Løgtinginum, og Løgtingið skuldi sjálvt velja sín formann og næstformenn. Amtmaðurin skuldi framvegis hava rætt til at møta í tinginum, taka orðið og taka lut í samráðingunum, men hann skuldi einans hava atkvøðurætt, um so var at hann var *valdur* tingmaður. Harumframt skuldi Løgtingið hava rætt til beinleiðis at leggja lógaruppskot fyri donsku stjórnina. Hetta uppskotið, sum var nógv víðgongdari enn uppskotið hjá Effersøe frá 1881, og sum Amtmaðurin eisini var ímóti, varð felt longu í Løgtinginum, har tað einans fekk 5 atkvøður. 12 løgtingsmenn atkvøddu fyri at útseta málið. Hetta uppskotið, og eitt líknandi uppskot frá 1890, sum eisini var felt, kom tí ikki ríkismyndugleikunum í hendi.

Ilt er at siga nakað við vissu um hvørt tað hevði eydnast at fáa Amtmannin úr Løgtinginum, um breið semja hevði verið um tað millum tingmanningina í 1880-unum. Um samanborið verður við donsk viðurskifti, so er tað nakað, sum talar ímóti, tí har var ikki farið at tosa um at fáa Amtmannin úr donsku Amtsráðunum fyrr enn aftaná 1915, tá grundlógin varð broytt í ein meira fólkaræðisligan rætning. Í 1917 vóru allir flokkar í Ríkisdegnum í *meginregluni* samdir um at Amtmaðurin skuldi úr donsku Amtsráðunum, men hetta gjørdist kortini ikki veruleiki fyrr enn eina hálva øld seinni. Í øllum førum kann staðfestast, at uttan breiða semju í Føroyum um spurningin var lítið sum talaði fyri, at undirtøka fekst fyri ætlanini í Danmark.

Stríðið hjá Løgtingsmeirilutanum móti Dahlerup í 1860 kann best skiljast sum eitt stríð móti persóninum Dahlerup, og í minni mun eitt stríð móti Amtmansembætinum, men tá komið verður móti endanum av 19. øld er vend við koma í. Nú verður tað týðuligt, at stríðið ikki er rætta móti nøkrum ávísum persóni, men talan er um eitt meira tilvitað politiskt stríð móti sjálvum Amtmansembætinum í Løgtinginum. Tað er Amtmansembætið, sum Schrøder vil hava úr Løgtinginum, ikki ein ávísan Amtmann. Við byrjanina av 20. øld var tað við at gerast greitt fyri pørtum av Løgtingsumboðunum, at tað var óheppið fyri arbeiðið í Løgtinginum, at Amtmaðurin og Prósturin høvdu ávirkan á tann fólkaræðisliga partin av Løgtingsarbeiðinum, hóast teir væl kundu taka sær av teimum fyrisitingarligu uppgávunum hjá Løgtinginum. Sjálvstýrisflokkurin, sum var stovnaður í 1909, sum eina avleiðing av politiska ósigrinum rundan um Tilboðið frá 1906, hevði uppskot frammi um hetta longu í 1916, men av tí at Sambandsflokkurin, sum var stovnaður í 1906, hevði meirilutan í Løgtinginum, kom einki burturúr. Tað sum endaliga legði lunnarnar undir eina stóra endurskoðan av Løgtingslógini vísti seg kortini sum so mangan fyrr ikki at koma sum

eitt einmælt krav úr Føroyum, men sum úrslit av fólkaræðisligum nýskipanum í Danmark. Í Danmark var grundlógin broytt í 1915, og hevði hetta við sær, at øll umboðini í Ríkisdegnum vóru vald av teimum, sum valrætt høvdu. Hetta kundi ikki annað enn ávirkað samansetingina av Amtsráðunum og Løgtinginum.

**Adressumálið í 1917**

Tað var natúrligt, at tílíkar fólkaræðisligar nýskipanir, sum hendu í Danmark í 1915 eisini vóru framdar í Løgtinginum. Tað eydnaðist Ríkisdegnum at broyta løgtingslógina í 1916, soleiðis at føroysku kvinnurnar fingu valrætt á jøvnum føti við tær donsku, men 1. veraldarbardagi, sum brast á í 1914, útsetti tær stóru broytingarnar í løgtingslógini í nøkur ár. Kortini vóru tað júst hendingar undri 1. veraldarbardaga, sum vístu, hvussu óheppin skipanin við Amtmanninum sum formanni í Løgtinginum í veruleikanum var.

Í 1917, tvs. undir 1. veraldarbardaga komu partar av Løgtingsumboðunum í veruligt stríð við Amtmannin, Svenning Rytter. Fortreytirnar fyri hesum stríði var tað vørutrot, sum stóðst av krígnum. Tey krígsførandi londini, Týskland, Frakland og Ongland løgdu minusperringar út ymsastaðni í atlantarhavinum, við tí fyri eyga at avbyrgja fíggindan. Løgtingið, sum var saman í august 1914, tá kríggið byrjaði, setti alt fyri eitt eina vørunevnd, Amtmaðurin og 4 løgtingsumboð, sum skuldi syrgja fyri, at vøra altíð var í Føroyum til 2 mánaðir. Veruligir trupulleikar stóðust ikki av hesum fyrr enn í februar 1917, tá Týskland, sum eitt mótsvar uppá enska og franska handilsstongsulin av Týsklandi, fór at føra kavbátakríggj móti øllum skipum, sum sigldu uppá Ongland. Samstundis kravdu bretar, at øll skip, sum komu inn í farvatnið kring Ongland, skuldu leggja inn í bretska havn til eitt sokallað kontrabandaeftirlit. Aftaná 1. februar 1917 hevði hetta við sær, at øll skip, sum sigldu uppá Føroyar, noyddust at leggja leiðina inn í bretska havn til eftirlit, við tí avleiðing, at tey eisini komu inn í týska kavbátaøkið. Hetta hevði við sær, at eingin vøra kom til Føroya í tveir mánaðir. Vørunevndin og ríkismyndugleikarnir arbeiddu við málinum, men partar av Sjálvstýrisflokkinum metti ikki, at nóg mikið var gjørt. Tá tað ikki eydnaðist at kalla tingið saman til eykatingsetu, fór flokkurin, umvegis valfelagið í Suðurstreymoy, Framburðsfelagið, undir at savna inn undirskriftir í Føroyum, sum skuldu sendast til bretskar myndugleikar, saman við eini umsókn um at føroysk skip sluppu undan at leggja leiðina inn í vandasjógvin kring bretsku oyggjarnar. Hetta Fortreytirnar fyri hesum stríði var, at vøruflutningurin til Føroya var nakað tarnaður orsakað av krígnum.

**Adressumálið**

Helst hevði politiska stríðið um Tilboðið í 1906 sett nøkur skør í álitið millum Jóannes Patursson og donsku Vinstrastjórnina, men góða samstarvið millum sjálvstýrisrørsluna og ríkismyndugleikarnar helt áfram undir radikalu stjórnini, sum

kom aftaná. Líka til 1918 vóru viðurskiftini millum sjálvstýrisrørsluna og stjórnina so mikið góð, at bæði amtmaðurin Svenning Rytter og andstøðan í danska ríkisdegnum hildu, at danska stjórnin í veruleikanum hjálpti sjálvstýrisrørsluni, meðan hon arbeiddi ímóti Sambandsflokkinum. Amtmaðurin kendi seg beinleiðis sviknan av stjórnini.

Ì 1920 var broyting komin í, og viðurskiftini millum partar av sjálvstýrisrørsluni og donsku ríkismyndugleikarnar var kólnað. Fortreytirnar fyri hesi gongd liggja í tíðarskeiðinum frá 1914 til 1918, tá 1. veraldarbardaga leikaði á. Hetta tíðarskeiðið vísti føroyingum, hvussu svikaligt sambandið millum Føroyar og Danmark kundi vera, tá stórpolitisku viðurskiftini vóru spent.

Í løgtingstíðindi sæst, at løgtingið gjøgnum øll krígsárini metti vøruflutningin til Føroya at vera eitt stórt vandamál. Hesin ótti var ikki heilt ógrundaður, tí sjálvt um hvørki Danmark ella Føroyar vóru hersett undir 1. veraldarbardaga, so var handilsliga samskiftið millum londini nógv avmarkað gjøgnum alt kríggið. Tey krígsførandi londini, Týskland, Ongland og Frakland settu minusperringar út ymsastaðni í Norðuratlantshavinum við tí fyri eyga at avbyrgja fíggindan handilsliga. Avleiðingin varð, at Føroyar og Danmark partvíst vóru avbyrgd frá hvørjum øðrum. Tað gjørdist tí átrokandi fyri løgtingið at royna at fáa vørur til Føroya umvegis Ísland ella Amerika. Støðan var ikki hættislig at byrja við, men seinni skuldi tað fáa stóran týdning fyri Føroyar, at bretar kravdu, at øll skip, sum komu inn í bretskt sjóøki, skuldu leggja leiðina fram við Kirkwall í Orknoyum til eitt sokallað “kontrabanda” eftirlit.

Løgtingið var saman í 1914, tá kríggið byrjaði, og í hesum sambandi varð ein *Vørunevnd* sett, sum taldi 5 umboð og amtmannin Svenning Rytter. Vørunevndin skuldi taka sær av øllum viðurskiftum og trupulleikum við vøruflutninginum til Føroya, sum kundu standast av krígsstøðuni. Aðalmálið hjá vørunevndini var at syrgja fyri, at tað altíð var so mikið av vørum í Føroyum, at oyggjarnar kundu klára seg í 3 mánaðir uttan handilssamband. Í 1916 avgjørdi løgtingið at senda tveir handilskønar menn til Íslands, til tess at “*undersøge Mulighederne for en eventuel samlet islandsk-færøsk Forretningsforbindelse med Amerika*”. Fuglafjarðarkeypmenninir S.P. Petersen og Jens Evensen vóru í hesum sambandi í Íslandi í 1917 og samráddust við íslendskar myndugleikar.

Í tíðarskeiðinum frá 1916 til 1917 var støðan viðvíkjandi vøruflutningi til Føroya versnað munandi. Týskland hevði tann 1. februar 1917, sum eitt mótspæl móti bretska handilsstongslinum mótvegis Týsklandi, avgjørt at fara undir eitt kavbátakríggj í atlantshavinum, sum skuldi vendast móti øllum skipum, sum sigldu uppá Ongland. Tá bretar undir hesum umstøðum hildu áfram við at krevja, at øll skip, - eisini tey, sum sigldu til ella frá Føroyum - skuldu leggja leiðina fram við Kirkwall í Orkneyum til eitt “kontrabanda” eftirlit, gjørdist støðan í Føroyum hættislig. Tað

gjørdist enn meira átrokandi enn áður hjá myndugleikunum at finna aðrar vegir at fáa vøru til Føroya.

Hóast íslendska stjórnin vísti seg at vera hjálpsom mótvegis teimum báðum fuglafjarðarkeypmonnunum, sum fóru til Íslands í 1917, so fekst einki ítøkiligt úrslit burturúr ferðini. Ein avtala millum føroyingar og íslendingar um vøruflutning til Føroya úr Amerika, umvegis Ísland, var treytað av góðkenning frá bretum. Uttan eina tílíka bretska góðkenning, sum loyvdi skipum til og frá Føroyum at sleppa undan at leggja leiðina fram við vandamikla sjóøkinum runt bretsku oyggjarnar, hevði ein avtala við íslendingar einki virði. Eina tílíka góðkenning vildu bretar ikki geva.

Frá februar í 1917 bendir samskiftið millum amtmannin og løgmálaráðið á, at komu ongar vørur til Føroya innan endan á mars, so fór støðan at gerast álvarsom í oyggjunum, tá komið varð inn í apríl mánað. Ríkismyndugleikarnir og vørunevndin arbeiddu við málinum, men partar av sjálvstýrisrørsluni og andstøðuni í løgtinginum hildu ikki, at myndugleikarnir gjørdu nóg mikið við spurningin. Eftir at tað ikki hevði eydnast Jóannesi Patursson í februar mánað at savna helvtina av tingmanningini, soleiðis at løgtingið kundi kallast saman til eykatingsetu at viðgera hetta málið, - tað eydnaðist heldur ikki Patursson at sannføra allar sjálvstýristingmenninar um, at tingið átti at verða kallað saman - kallaði valfelag Sjálvstýrisfloksins, *Framburðsfelagið* til fundar í Havn tann 18. mars 1917. Á hesum fundinum varð samtykt, at eitt bræv skuldi sendast til ensku stjórnina við ynski um, at føroysk skip fingu frítt at fara millum Ísland og Føroyar, og sluppu undan at sigla gjøgnum vandasjógv til eftirlit í bretskari havn. Brævið til bretar skuldi sendast saman við eini “fólkaadressu“, sum skuldi savnast í Føroyum.

Amtmaðurin Svenning Rytter kallaði løgtingið saman tann 28. mars 1917 at viðgera fólkaadressuna, og saman við sambandsmeirilutanum í løgtinginum ávaraði hann føroyingar ímóti at skriva undir fólkaadressuna. Formanskapurin í løgtinginum og løgtingsmeirilutin helt ikki, at tað var rætt, at føroyingar vendu sær beinleiðis til fremmanda stjórn í krígstíð. Hartil vísti løgtingsmeirilutin á, at adressan bygdi á skeivar fortreytir, tí íslendingar høvdu tann 23. mars boðað løgtinginum frá, at eingin hjálp kundu koma úr Íslandi; har var eisini vørumangul. Ríkismyndugleikarnir og vørunevndin arbeiddu hinvegin við spurninginum út frá teimum fortreytum, at vørur skuldu fáast til Føroya á ein ella annan hátt, og seinast í apríl 1917 eydnaðist danska uttanríkismálaráðnum at fáa dampskipið “Ísland” til Føroya við 700 tonsum av vøru.

Hóast ávaringarnar frá amtmanni og løgtingsmeiriluta, fóru sjálvstýrismenninir móti endanum av mars mánaði undir at savna undirskriftir millum føroyingar, sum skuldu sendast til bretar saman við áheitanini um, at skip til og úr Føroyum sluppu undan “kontrabanda“ eftirliti í Kirkwall. Ein adressa fór at ganga, og savnaðar vóru 3.242 undirskriftir millum allar føroyingar - kvinnur og menn, ið vóru omanfyri 18 ár.

Áheitanin til bretar og adressan vóru ikki send beinleiðis til bretsku myndugleikarnar, tí tá samanum kom tóku sjálvstýrismenninir ávaringarnar frá amtmanninum og løgtingsmeirilutanum til eftirtektar. Tann 17. apríl 1917 varð áheitanin og adressan, umvegis danska sendiharran í London, send til bretsku stjórnina. Danski sendiharrin í London, sum sostatt fekk til uppgávu at bera bretsku stjórnini boðini, bað um nærri upplýsingar úr Keypmannahavn, men áðrenn nakað kom burtur úr, var trupuleikin viðvíkjandi vøruflutningi til Føroya loystur. T.d. vóru 700 tons av vøru komnar til Føroya seinast í apríl mánað. Áheitanin og adressan komu tí ongantíð bretsku myndugleikunum í hendi.

Adressan var ikki ein tilætlaður strategiskur liður í valstríði Sjálvstýrisfloksins upp undir løgtingsvalið 24. apríl 1918, men innanríkispolitiskt vóru krígsstøðan og adressumálið helst góð fyri Sjálvstýrisflokkin, tí í 1918 fekk flokkurin á fyrsta sinni meirilutan í løgtinginum. Í maj í 1918 avgjørdi tann nýggi løgtingsmeirilutin at senda eina nýggja nevnd, ið varð sett saman av 5 løgtingsumboðum, til Reykjavíkar, til tess at fáa í lag avtalu við íslendsku stjórnina um vøruflutning til Føroya. Hesu ferð gekk betur, tí út ímóti sumri í 1918 slakaðu bretar uppá krøvini til “kontrabanda“ eftirlit við skipum, ið sigldu millum Føroyar og Ísland.

Í 1918 metti løgtingið at spurningurin um vøruflutning til Føroya var loystur, men adressan hevði neyvan havt nakran avgerandi týdning fyri gongdina í málinum. Fyri tað fyrsta kom adressan ongantíð bretsku myndugleikunum í hendi, og hon kann tí ikki hava ávirkað bretsku myndugleikarnar í síni støðutakan. Í øðrum lagi er tað heldur ikki serliga sannlíkt, at donsku ríkismyndugleikarnir, sum frammanundan gjørdu eitt stórt arbeiði fyri at fáa vørur til Føroya, orsakað av adressuni, løgdu eitt enn størri trýst á bretsku myndugleikarnar enn teir høvdu gjørt frammanundan. Í triðja lagi er tað greitt, at tað ikki var nýggja føroyska løgtingið, sum átti høvuðsæruna av, at bretska “kontrabanda” eftirlitið gjørdist lakari í 1918. Donsku ríkismyndugleikarnir megnaðu ikki at fáa bretar til at lætta um fortreytirnar fyri vøruflutningi til Føroya í 1917, og tað er tí óhugsandi, at løgtingið einsamalt skuldi megnað hetta í 1918.

Í 1917 var USA komið upp í kríggið á síðuni hjá Onglandi og Fraklandi. Hetta broytti í longdini valdsjavnvágina millum teir stríðandi partarnar. Tað var óivað tann stórpolitiski veruleiki, at Ongland, Frakland og USA vóru um at vinna kríggið móti Týsklandi og Eysturríki-Ungarn, sum var høvuðsgrundin til, at tað ikki longur var so átrokandi fyri bretar at varðveita stranga eftirlitið við skipaferðsluni í Norðuratlantshavinum. Tá komið var móti sumri í 1918 var spurningurin ikki longur *hvør* fór at vinna kríggið, men spurningurin var einans *nær* Týskland og Eysturríki-Ungarn fóru at geva seg yvir. Tann 11. november 1918 undirskrivaði Týskland vápnahvíldaravtaluna, og 1. veraldarbardagi var av.

Adressumálið var helst viðvirkandi til at Sjálvstýrisflokkurin vann løgtingsvalið tann 24. apríl 1918, men í aðra mátar hevði tað lítlan týdning fyri vøruflutningin til

Føroya. Harafturímóti fekk málið eitt politiskt eftirspæl í Danmark, sum kom at fáa týdning fyri politisku viðurskiftini millum Danmark og Føroyar. Danski stjórnarleiðarin Zahle metti, helst av røttum, at adressumálið var útinnt og endað á løgfrøðiliga rættan hátt. Tí vóru eingi rættarlig stig tikin móti fólkunum aftanfyri adressuna, men Rytter amtmaður, sum óivað helt seg hava stóran part av æruna av, at adressumálið spældi væl av tá samanum kom, helt seg ikki í nóg stóran mun verða stuðlaðan av donsku ríkismyndugleikunum í sínum arbeiði í Føroyum undir krígnum. Tað fall heldur ikki í góða jørð hjá Rytter, at danski stjórnarleiðarin Zahle stuðlaði sjálvstýrismanninum Edvard Mortensen (frá 1923 Edward Mitens) upp undir fólkatingsvalið, sum skuldi vera 22. apríl 1918, men heilt galið gjørdist tað tann 15. mars í 1918, tá Zahle í einum fjarriti til Rytter bað hann syrgja fyri, at Edward Mortensen varð kunnaður um støðu sína. Svenning Rytter kendi seg beinleiðis svíktan av Zahle, og saman við sorinskrivaranum og fútanum segði hann seg úr starvi tann 17. mars 1918.

Nakrar mánaðir seinni kom danskur innanríkispolitikkur upp í málið. Tann konservativi meirilutin í landstinginum fekk í juli í 1918 borið so í bandið, at sett varð ein 11 manna nevnd, sum í fyrsta lagi skuldi kannað adressumálið í Føroyum í 1917, og í øðrum lagi skuldi nevndin kanna, í hvønn mun radikala stjórnin hjá Zahle hevði hjálpt fólkunum aftanfyri adressuna í Føroyum upp undir fólkatingsvalið í 1918. Jóannes Patursson, sum kundi hugsast at vera ein av teimum høvuðsákærdu, var føroyska umboðið í 11 manna nevndini. Eftir drúgvar skjalakanningar og vitnisavhoyringar varð skrivað ein frágreiðing, sum saman við rúgvismiklum og fyri føroyska søgugransking týdningarmiklum fylgiskjølum og vitnisfrágreiðingum, fevndi um nærum 1000 síður. Frágreiðingin, sum í Føroyum fekk tað óalmenna heitið *Fúlabók*, varð liðug tann 15. januar í 1920. Nevndin býtti seg sundur í ein meiriluta uppá 7 og ein minniluta uppá 3. Jóannes Patursson var ikki í Danmark, tá tann endaliga frágreiðingin var skrivað. Meirilutin í nevndini ákærdi radikalu stjórnina hjá Zahle fyri at hava hjálpt sjálvstýrismonnunum upp undir fólkatingsvalið í 1918. Um Jóannes Patursson, formann Sjálvstýrisfloksins, sum var limur í nevndini, varð sagt, at hann ”*hørte hjemme paa den anden Side af Skranken*”, og hann varð ákærdur fyri at hava framt “*rigsskadelig Adfærd*“ í 1917, tá áheitanin og adressan varð send til bretar. Minnilutin metti ikki at nakað beinleiðis óregluligt var hent í málinum.

Fúlabók og adressumálið fingu hvørki í Danmark ella í Føroyum nakrar *rættarligar* ella *stjórnarligar* avleiðingar, tí tá samanum kom varð ikki mett, at grundarlag var fyri at reisa ákæra móti nøkrum í málinum, men málið fekk ta *politisku* avleiðing, at viðurskiftini millum Jóannes Patursson og partar av sjálvstýrisrørsluni á aðrari síðuni og danskar myndugleikar á hinari síðuni versnaðu skjótt. Ákæran um ríkisskaðiliga atferð kundi ikki annað enn seta kílar ímillum góðu viðurskiftini teirra millum. Stríð Sjálvstýrisfloksins móti donskum embætismonnum var um at broytast til eitt stríð móti donsku ríkismyndugleikunum, tá komið varð inn í 1920uni.